umhvørvisstovan

# Umhvørvisárinsmeting av ætlanum við uppsetan av vindmyllum

**Henda vegleiðing er ætlað feløgum o.ø., sum skulu gera umhvørvisárinsmetingar í sambandi við ætlanir um at fara undir elframleiðslu við vindorku á landi.**

## Lógargrundarlag

Sambært grein 16 í Elveitingarlógini[1] skal umhvørvisárinsmeting verða gjørd, og úrslit av hesari meting vera góðtikin av Innlendismálaráðnum, áðrenn Vinnumálaráðið veitur loyvi til framleiðslu av ravmagni.

## Arbeiðsskrá

Áðrenn farið verður undir umhvørvisárinsmetingina, skal arbeiðsskrá latast Umhvørvisstovuni til góðkenningar. Arbeiðsskráin skal vísa, hvussu umhvørvisárinsmetingin verður skipað, og tryggja, at metingarnar fevna um viðurskifti nevnd í hesi vegleiðing. Lýsast skal nær og av hvørjum metingin verður gjørd, og hvørjar kanningar fara at vera gjørdar.

## Um umhvørvisárinsmeting, krøv, hoyring o.a.

Umhvørvisárinsmetingin skal á greiðan hátt vísa allar viðkomandi upplýsingar um verkætlanina, so at viðkomandi almenningur, myndugleikar og felagsskapir í mest møguligan mun fáa nøktandi innlit og kunnu meta um, hvørji árin verkætlanini fer at fáa á umhvørvið. Umhvørvisárinsmetingin skal í minsta lagi innihalda upplýsingar og metingar sambært punktunum í fylgiskjalinum, og skal fyri hvørt punkt koma við tulkingum av úrslitum og greiðum niðurstøðum.

Eftir at umhvørvisárinsmetingin er gjørd, skal hon leggjast fyri viðkomandi kommunu og aðrar viðkomandi myndugleikar og almenning til hoyring. Umhvørvisstovan almannakunnger upplýsingar um, at umhvørvisárinsmeting er gjørd og at tilfarið kann fáast. Øll hava rætt til at fáa tilfarið til hoyring. Hoyringsfriestin er 6 vikur. Umhvørvisstovan viðgerð innkomnu hoyringssvarini, og tekur avgerð um, hvørt loyvi kann veitast ella um tørvur er á fleiri upplýsingum.

## Undantak

Í heilt serligum førum kann undantak frá kravinum um umhvørvisárinsmeting verða givið, t.d. tá fyrr gjørdar kanningar og metingar geva nóg gott grundarlag fyri at taka avgerð.

1 Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008.



**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tel +298 34 24 00 · Faks +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

## Fylgiskjal

### Umhvørvisárinsmetingar skulu innihalda upplýsingar um:

1. **Frágreiðing um verkætlanina, so sum:**
   - staðseting, lendistørv o.a. (tal av myllum, mynstur í uppseting, hædd á tornum, vídd á rotori, litur, snúningsferð o.a.)
   - annað virksemi í økinum, sum kann ávirka náttúru og umhvørvi
   - tíðarætlan fyri verkætlanina, bæði bygging og rakstur
   - trygdarviðurskifti (fær ætlanin ávirkan á flogferðslu ella hernaðarlig viðurskifti, verður bilferðsla órógvað, vandi fyri brotnum veingjum, glerpípur o.a.)
   - endurstovnan av økinum aftaná lokna verkætlan
2. **Lýsing av umhvørvisárinum, bæði í sambandi við bygging og rakstur (eisini positiv árin sum t.d. minni útlát av vaktrarhúsgassum):**
   - ampar av óljóði
   - útlát av dálkandi evnum o.a., so sum spillivatn, útlát til jørð og luft, ristingar, ljós, geisling o.a.
3. **Grundgeving fyri val av staði og yvirlit yvir onnur støð, sum hava verið upp á tal.**
4. **Lýsing av náttúru og umhvørvi á staðnum og tí ávirkan, sum ætlanin kann hava á eitt nú:**
   - fólk og bústaðarøki (frástøða til nærmastu grannar, stutt- og langtíðar metingar av óljóði, ristingum, geislingum, skuggakasti, endurskini, ávirkan á sendinet o.a.)
   - djóralív og gróður (ávirkan á fuglalív, djóra- ella plantusløg á leiðini, sum serlig atlit skulu takast til, her undir friðað øki og Ramsar øki/tilnevnd Ramsar-øki)
   - rekreativ virði, landslag, fornminni og byggifrøðilig viðurskifti (t.d. hvussu myndin av myllum í landslagnum fer at ávirka upplivingina av hesum viðurskiftum. Myndir skulu gerast, sum vísa, hvussu myllurnar koma at síggja út í landslagnum frá grannahúsum og nærmasta bústaðarøki, vegum við nógvari ferðslu, øki har nógv fólk ferðast og har ávirkan verður á serlig náttúruvirðir og mentunararv)
5. **Hvørji tiltøk ætlandi verða sett í verk fyri at avmarka møguliga ávirkan á náttúru og umhvørvi.**
6. **Ein ikki ov tekniskan samandrátt av omanfyri nevndu upplýsingum.**

Fyrstu ferð útgivin: 04.05.2011
Seintast dagført: 04.05.2011
Útgava nr.: 1



**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tel +298 34 24 00 · Faks +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo